Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Grímur Sundstein, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Endurgjald fyri AMEG goldið í ósamsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd

Spurningar:

1. Hevur Fíggjarmálaráðið gjørt nakra endurgjaldsætlan fyri AM-gjøld, sum TAKS vegna AMEG hevur kravt inn í ósamsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd fyri árini áðrenn 2019 ?
2. Verður eitt møguligt endurgjald goldið afturvirkandi til, tá norðurlendski sáttmálin um sosiala trygd fekk gildi, uttan fyrning og við rentum ?

Viðmerkingar:
TAKS hevur í mong ár sýtt m.a. føroyskum útisiglarum uttanlands og norðurlendingum í Føroyum [fevnd av sosialari trygd í øðrum Norðurlandi] undantøku at rinda til AMEG, vísandi til at ongin heimild er í føroyskari lóggávu at veita slík undantøk, hóast kærustovnar og dómstólar hava staðfest, at m.a. heilsutrygdargjaldið og AM-gjaldið í mong ár hava verið kravd inn í ósamsvari við norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd [NS].

Fyri AMEG eru hesi viðurskifti komin 'partvíst' í rætt lag við lógarbroyting aftur til 2019. Fyri árini áðrenn 2019 hevur ikki verið møguligt at søkt um undantak.

Á vári 2025 samtykti Løgtingið lóg um afturrindan av heilsutrygdargjaldi, sum hevur til endamál at afturrinda heilsutrygdargjøld, sum eru kravd í ósamsvari við NS.

Í svari til § 52a fyrispurning [52-044/2024] stendur, at *"Avgerð um afturrindan av AM-gjøldum og um, hvussu langt farið verður aftur í tíð, verður ætlandi tikin við støði í sama lesti sum fyri afturrindan av heilsutrygdargjaldi."*

Í ársfrásøgnini fyri 2024 hjá AMEG undir 'eventualskyldur' stendur m.a. at lesa, at:
"*Í 2023 tók Eystari Landsrættur avgerð til fyrimunar fyri teir, ið høvdu kært Heilsutrygd fyri at krevja heilsutrygdargjald frá persónum, sum sambært Nordisku konventión ikki skulu rinda sosial gjøld í tveimum londum, tá rættur bert er til útgjald í øðrum landinum. [...] Í 2024 hevur stýrið tikið avgerð um at innrokna ta upphædd, sum TAKS hevur roknað fyri tíðarskeiðið 2014 og frameftir, at grunnurin kann koma at rinda út aftur. Talan er um 80 mió.kr."*

Nú Heilsumálaráðið er komið til ta niðurstøðu, at heilsutrygdargjaldið verður endurgoldið og lógin er samtykt, er framvegis ongin almenn endurgjaldsætlan løgd fram fyri AM-gjøld, sum TAKS vegna AMEG hevur kravt inn í ósamsvari við NS.
Fyri at fá greiðu á gongdini í hesum máli, verður hesin fyrispurningur settur fyri at vita, um Fíggjarmálarráðið eisini ætlar at endurrinda tey sosialgjøld sum TAKS vegna AMEG hevur kravt inn í heimildarloysi.

Á Løgtingi, 14. november 2025

Grímur Sundstein